Álit

í

løgtingsmáli nr. 92/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin) (Ígildissetan av 4. og 5. hvítvaskdirektivi o.a.)

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum, hevur lagt málið fram tann 28. mars 2023 og eftir 1. viðgerð tann 30. mars 2023 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 21. og 26. apríl 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Felagið Peningastovnar.

Við uppskotinum til løgtingslóg um broyting í hvítvasklógini verður lagt upp til eina røð av broytingum. Nakrar av broytingunum er um somu evnir, sum í løgtingsmáli nr. 86/2022 og eru í høvuðsheitum hesar:

Listahandlarar verða nú fevndir av lógini.
Skráseting av veruligum eigarum í feløgum og øðrum løgfrøðiligum eindum, so sum útlendskum trustum v.m.
Víðkað varskógvaraskipan fyri feløg og persónar, sum eru fevnd av lógini.
Áløgd skylda, at leiðandi starvsfólk uttan drál skulu boða ovastu leiðsluni á stovninum frá, tá tey hava fingið fráboðan um mistanka um hvítvask og ella terrorfígging.
Víðkað tagnarskylda hjá starvsfólki hjá almennum mynduleikum, ið eru fevnd av lógini um hvítvask.
Víðkað upplýsingar- og rættingarskylda hjá tryggingarfeløgum o.ø., sum eru undir eftirliti av Tryggingareftirlitinum.
Nýggj heimild til Tryggingareftirlitið um fyribils steðg fyri nýggj kundasambond, tá álvarsligt brot er framt á hvítvasklógina.
Heimild til Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið um fyrisitingarlig sektaruppskot.
Hækka fyrningarfreistina fyri grov brot á lógina úr 5 upp í 10 ár.

Uppskotið er enn ein herðing av reglunum/ lógunum um hvítvask, sum tekur støði í 4. og 5. hvítvaskdirektivi hjá EU. Føroyar mangla at dagføra seinastu broytingarnar, ið EU hevur sett í gildi. Upplýst er fyri nevndini, hvørja avleiðing tað fer at hava, um vit velja ikki at dagføra lógirnar um hvítvask.
Vit fara at blíva sett á listan yvir hárisiko lond, so sum Uganda, Suður Sudan, Marokko, Mali og Haiti, og tað fer at hava stórar neiligar avleiðingar fyri virkismøguleikarnar hjá landi og fólki.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 28. apríl 2023

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstformaður	Uni Holm Johannesen
Karlot Hergeirsson	Árni Skaale	Jørgen Niclasen

Eyðdis Hartmann Niclasen